## Fara at renna jólini inn

Aftur í ár fara tey at renna jólini inn í Suðurstreymoy. Tað gera tey við at renna jólaaftan til allar tær 10 kirkjurnar í Suðurstreymoy jólaaftan. Øll eru vælkomin og rennararnir møta við húsið hjá Bragdinum jólaaftansmorgun klokkan 10.30. Men fyrireikarnir leggja dent á, at tað ber væl til at klippa av túrinum og bara taka nakrar kirkjur, kanska bara tær í Havn. Tað ber eisini til at fáa sær ein gongutúr til nakrar kirkjur í Havn. Annars frá luttakararnir saft og vatn í Kirkjubø og í Bragdar-húsinum eftir túrin. Fyrstu ferð, skipað var fyri hesum tiltakinum, var í 2005 og tá var bara ein rennari. Men árið eftir møttu sjey fólk upp. Tvey av teimum runnu til allar 10 kirkjurnar í Suðurstreymoy, tvey fólk runnu til kirkjurnar í Havn og tvey gingu til kirkjurnar i Havn.

**Síðani renna tey til:**
1. Nýggju katólsku kirkjuni
2. Gomlu katólsku kirkjuni
3. Argja kirkju
4. Kirkjubøar kirkju
5. Múrin
6. Toftirnar av Mariu kirkjuni
7. Vesturkirkjuna
8. Havnar kirkju
9. Adventistakirkjuni
10. Hoyvíkar kirkju



# Vestmenningar vilja eisini hava tunnil

**Borgarstjórin í Vestmanna vónar, at valevnini í Norðurstreymoy til løgtingsvalið í januar fara at gera tunnil ímillum Vestmanna og Leynar til eitt mál valstríðnum**

FERÐSLA
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*Vestmanna er krøkt av teirri menning, sum er rundanum bygdina, bæði í Vágum og í Sundalagum. Borgarstjórin ivast ikki í, at vegasambandið er største forðingin fyri menning*

Skal Vestmanna hava nakran møguleika at mennast, er tað neyðugt, at tunnil verður gjørdur úr Vestmanna til Leynar, áleið har sum undirsjóvartunnilin er.

Tað staðfestir Karl A Olsen, borgarstjóri í Vestmanna.

Hann sigur, at tað vísir seg heilt týðiligt, at Vestmanna fær ikki lut í teirri menning, sum annars bæði er í Vágum og í Sundalagnum.

- Vit hava grundstykki til taks, men sleppa ikki av við tey, tí ongin áhugi er at byggja her, sigur hann.

Hann ivast ikki í, at tað er vegurin til og úr bygdini, sum er atvoldin til tað.

- Vegurin um Høgareyn liggur høgt uppi, har er ógvuliga bratt og mangan sera hált. Tá ið vit spyrja okkum fyri siga fólk heilt ofta, at tey tora so illa at koyra um Høgareyn um veturin, tí tað er neyvan nakrastaðni, at bygdarvegurin liggur so høgt uppi í fjøllunum.

- Vit hoyra mangan um, hvussu hált tað er á Høgareyni og tíverri hoyra vit eisini um bilar, sum fara útav og vanlukkum eru vit heldur ikki sloppin undan.

- Sostatt fáa vit ikki fleiri íbúgvar í bygdina, tí hóast annar hjúnafelagin hevur tilknýti til bygdina, er tað nóg mikið, at hin ikki torir at koyra, tí so búsetast tey onkra aðrastaðni.

Borgarstjórin staðfestir eisini, at tað hevði eisini verið ein munandi bati hjá vinnulívinum at sloppið frá at brúkt tíð og brennievnið upp á at koyrt upp um fjøll.

Umframt at talan hevði verið um at koyrt fram eftir sløttum, hevði ein tunnil eisini gjørt farleiðina eitt sindur styttri.

Ein tunnil úr Vestmanna til Leynar er við í samferðsluætlanini hjá Vinnumálaráðnum, men hann er raðfestur rættiliga aftarliga.

- Men vit ætla at gera, hvat vit kunnu fyri at fáa hann longur fram í raðfestingina.

Karl A Olsen sigur tískil, at nú løgtingsval verður, vónar hann at valevnini í Norðurstreymoy fara at geva tunnilin til eitt stórt mál í valstríðnum.

Annars hevur Vestmanna Kommuna eisini heitt á vinnumálaráðið um at gera tunnil ímillum Vestmanna og Leynar.

So vítt vit minnast er tað seinasta, vit hoyrdu um tunnil millum Vestmanna og Leynar, var fyri akkurát tveimum árum síðani, tá ið Heidi Petersen, løgtingskvinna fyri Tjóðveldið, spurdi Bjarna Djurholm eftir tunlinum.

Tá vísti hon á, at teljingar hjá Landsverki vísti, at í 2004 koyrdi 1016 bilar til og úr Vestmanna um samdøgrið. Til samanberingar kann vísast á, at ferðslan til og úr Vágum í 2004 var 1015 akfør um samdøgurið.

Í einum uppskotið um linjuføring, sæst, at ein tunnil ímillum Vestmanna og Leynar verður einar seks kilometrar langur og í dag eru tað 12 kilometrar at koyra.

Heilt leyðsliga mett fer ein slíkur tunnil at kosta 300 milliónir.

# Tríggir møguleikar at velja í

**Í januar verður fólkaatkvøða í Vestmanna um hvønn veg, vestmenningar skulu fara Valið stendur ímillum at fara vestureftir til Vágar, at leggja seg uppat Streymoynni og Havnini og ella at fara eystureftir til Sundalagið**

FÓLKAATKVØÐA
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Nú er stundin komin hartil, at vestmenningar skulu taka støðu til, hvar teir vilja hoyra heima.

Tá ið løgtingsvalið verður tann 19. januar, verður samstundis fólkaatkvøða í Vestmanna um, hvat samstarvsøki Vestmanna Kommuna skal hoyra til.

Landsstýrið hevur álagt Vestmanna og Kvívík at taka støðu fyri 1. oktober í 2009 um, hvat samstarvsøki, báðar bygdirnar skulu hoyra til, so kommunan hevur góðar stundir.

Tað er eisini greitt, at báðar kommunurnar skulu upp í sama samstarvsøki og valið stendur ímillum at samstarva við Vágar, við Streymoy og sostatt eisini Tórshavnar Kommuna, ella at fara eystureftir og hella seg afturat Sunda Kommunu.

Í hesum døgum er bygdaráðið í ferð við at fyrireika fólkaatkvøðuna og mett verður, at frægast er at hava fólkaatkvøðuna samstundis sum løgtingsvalið er, tí tað tryggjar eina stóra valluttøku.

Men verður løgtingsvalið framskundað, er ikki vist, at tað eydnast at hava fólkaatkvøðuna samstundis.

Karl A Hansen, borgarstjóri í Vestmanna, sigur, at tá ið úrslitið av fólkaatkvøðuni er greitt, fer bygdaráðið í Vestmanna at seta seg í sambandi við myndugleikarnar í tí samstarvsøki, sum Vestmenningar hava valt fyri at vita um áhugi er fyri at leggja saman og, hvørjar treytirnar verða.

- Gongst væl í hond, er møguleiki fyri at leggja Vestmanna Kommunu saman við kommununum í tí samstarvsøki vit velja, tá ið næsta bý-og bygdaráðsval verður síðst í 2008.

Men hann leggur kortini dent á, at tað verður ongin samanlegging fyrrenn ein fólkaatkvøða hevur verið afturat um Vestmanna skal beinleiðis leggja saman við øðrum kommunum ella ikki.

Hann sigur, at eftirsum Kvívík og Vestmanna skulu velja sama samstarvsøkið, hevur bygdaráðið í Vestmanna kunnað Kvívíkar Kommunu um fólkaatkvøðuna, men vestmenningar hava onki frætt aftur.

### Samanlegging er best

Borgarstjórin leggur afturat, at fyri ikki at ávirka veljaran, fer bygdaráðið ikki at taka støðu til spurningin undan fólkaatkvøðuni.

Hinvegin er bygdaráðið fullsamt um, at tað er skilagott at leggja Vestmanna Kommunu saman við øðrum kommunum fyri at styrkja økið. Bygdaráðið heldur eisini, at tað besta er, at Kvívík og Vestmanna fylgjast í eini kommunusamanlegging.

- Við eini kommunusamanlegging, verður talan um eitt størri og sterkari øki, sum fær størri, figgjarligt rásarrúm og sum verður betri ført fyri at loysa tær uppgávur, sum landið væntandi fer at áleggja kommununum í næstu framtíð, sigur borgarstjórin.

- Samstundis verður eitt stórt øki sterkari mótvegis landsmyndugleikunum, leggur hann afturat.

Annars er Vestmanna Kommuna hampiliga væl fyri, bæði til skúla og annað og harafturat er kommunan í holt við at loysa eldraróktina við einum røktarheimið í bygdini.

- Men hugsa vit um at framtíðartryggja kommununa, halda vit, at tað er frægast at hava størri eindir, sigur Karl A Olsen.